# Leskiligt kók úr Vágsbotni

**Hósdagin sóðust fólk tysjast saman í Vágsbotni, har turrur fiskur, gamal náti og svartfuglur vórðu til sølu. Sølubásurin var ein bátur við uppspentum neti aftan, har svartfuglurin lá, og eisini stóð ein diskur uppi á bryggjuni – Vit hava verið millum Stong og Eystnes, og fingu heilt fitt, fortelur Niklas Hammer, ið saman við pápanum var farin at royna seg sum sølumaður**



VEIÐA

*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Niklas og pápin, ið eigur bátin fóru út í morgun og fingu um 30 álkur millum Stong og Eystnes. Teir komu inn aftur um miðdagsleitið, og løgdu bátin í vágsbotni, har teir seldu úr bátinum og av bryggjuni.

### Væl at fáa

Ikki bert er tað millum Stong og Eystnes, at væl er at fáa, í hesum døgum. Fleiri staðni hevur verið væl at fingið av svartfugli, og fleiri eru sæddir kring landið, koma nærum fullastaðir av veiðuferð.

### Keypshugur

Fólk vístu stóran áhuga fyri at bjóða, og tá blaðmaðurin var og vitjaði, var rættuliga fitt selt, og prísurin var eisini sømuligur, tí fyri bert 50 krónur, kundi man fáa sær eitt leskiligt kók.

## FAKTA

**Nær tað er loyvt at skjóta fugl:**

| | |
|---|---|
| **Alt árið:** | Kráku, ravn, kjógva, skúgv, náta, súlu og øll másasløg, tó kann rita bert veiðast á sjónum |
| **1. oktobur - 20. januar:** | Svartfugl, t.e. lunda, lomviga og álku |
| **1. oktobur – 30. novembur:** | Skarv |


ÚTBJÓÐING

## Prekvalifikatión í sambandi við nýggjan skúladepil við Marknagil

Við hesum bjóðar Landsverk áhugaðum ráðgevum at biðja um prekvalifikatión til luttøku í innbodnari lisitatión at projektera nýggjan skúladepil við Marknagil í Tórshavn.

Lýsing av verkætlan
Avgerð er tikin um, at Føroya handilsskúli og Tekniski skúli í Tórshavn skulu leggjast saman, og skúlarnir og myndugleikarnir fyrireika nú nýggjan skúladepil við Marknagil – í verklagslógini nevndur Miðnámsskúlin við Marknagil. Ætlanin við nýggja skúladeplinum er at menna skúlarnar, og byggiverkætlanin er millum tær størstu í føroyskari skúlasøgu. Depilin verður um 9000 m², og umhugsað verður eisini at gera verandi bygning hjá Føroya handilsskúla til part av samlaðu bygginini. Fíggjarkarmurin fyri verkætlanini er 150 mió. DKK uttan mvg.

Uppgávan fevnir um heildarráðgeving í sambandi við skipanar- og projektuppskot, for- og høvuðsprojekt, útbjóðing í høvuðsarbeiðstøku, projektuppfylging o.a.

Umsóknir um luttøku skulu sendast til
COWI A/S
Parallelvej 2
DK-2800 Kongens Lyngby
Att. Ann-Pia Puggaard

Síðsta freist at søkja um luttøku er mánadagin, 3. desember, 2007.

Meira at vita?
Áhugaðir ráðgevar fáa meira at vita við at venda sær til Landsverk, tlf. 340 800, ella við at vitja heimasíðu okkara, www.landsverk.fo.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

*Landsverk er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur um hendi vega-, byggi- og havnamyndugleikauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og tyrlupallar.*





## Móttøka

Í samband við at Sára Olsen gevst í starvi sínum eftir meiri enn 34 ára drúgva og góða tænastu, verður skipað fyri móttøku.

Móttøkan verður í matarhøllini hjá NFCS í Klaksvík hósdagin 8. november 2007, kl. 14 - 16.00.

Øll eru hjartaliga vælkomin.

FAROE SHIP



## Útbering av dagbløðum og reklamum





**LEYST STARV**

Vit søkja eftir fólki at bera bløð út í

**Lamba**

Ert tú 13 ár ella eldri, og hevur hetta tín áhuga, so ring á **tel 35 14 05** frá kl. 10 - 17 ella send ein teldupost:
**utbering@prent.fo**

**Prentmiðstøðin**

Smyrilsvegur 13 · Postboks 3314 · 110 Tórshavn
tel 34 14 00 · Útbering tel 35 14 05 · Fax 35 14 01
utbering@prent.fo · www.prent.fo